gult cyan magenta svart



# KÍ kvinnurnar eru meistarar

*Sí›sta umfar í føroysku kvinnudeildini var um vikuskifti›, og sum vænta› avgjørdu KÍ kvinnurnar til egnan fyrimun á Skála og gjørdust harvi› føroyameistarar ár 2000. HB og VB spældu um anna› og tri›ja pláss í Vági, har VB ogna›i sær silvurmerkini, me›an NSÍ vann stórsigur í Havn*

Heini í Skorini



*NSÍ syrgdi fyri mest óvænta›a úrslitinum hetta vikuskifti›, tá tær vundu burtur úr B36*

Mynd:Álvur Haraldsen

Undan sí›sta leikumfari› í føroysku kvinnudeildini var kravi› hjá KÍ, at tær skuldu vinna inni á Skála, og hetta krav uppfyltu tær til fulnar. Tær ogna›u sær sostatt føroyameistaraheiti› eftir eitt langt og spennandi kappingarár.

KÍ setti seg á dystin beinanvegin, og Rannvá Andreassen, sum hevur veri› millum t‡dningarmiklastu leikarar hjá KÍ í ár, skora›i heilt tí›liga til 1-0. Einki anna› mál kom í fyrra hálvleiki, og sostatt var stø›an 1-0 til KÍ kvinnurnar í hálvleikinum.

Ein 1-0 lei›sla er ongantí› ein trygg í fótbólti, og tí kundu KÍ kvinnurnar ikki kenna seg veruliga tryggar, tá tær komu út aftur til seinna hálvleik. Tær royndu tí, hvat tær kundu at fáa økt um lei›sluna so skjótt sum gjørligt, og ta› var júst ta›, KÍ megna›i at gera. Heilt tí›liga í seinna hálvleiki kundi Rannvá Andreassen enn einafer› skora› til 2-0, og sostatt var ta› ein lætti hjá KÍ kvinnunum, sum nú bert skuldu halda eini 2-0 lei›slu fyri at fáa meistaraheiti› vi› sær til Klaksvíkar.

Nervarnir komu tó aftur á KÍ li›i›, tá Ingun Johansen skeyt eitt fríspark beinlei›is í KÍ máli›, og minka›i til 2-1. Men KÍ nokta›i at søpla meistaraheiti› burtur, og Rannvá Andreassen fullførdi sítt hat-trick, tá hon vi› einum langskoti úr umlei› 30 metra fjarstø›u smekka›i bóltin upp í málhorni› og leg›i KÍ á odda 3-1. Seint í seinna hálvleiki gjørdist Viviann Bjartalí› leys, og hon sta›festi sigurin og skora›i til 4-1 til KÍ. Hetta var sætta mál hennara í ár. 4-1 gjørdist endaliga stø›an, og frøin var stór millum klaksvíkingarnar á Skála, tá dómarin bríksla›i fyri seinastu fer›. KÍ kvinnurnar lupu um hálsin á hvørjari a›rari, og meistaraheiti› høvdu tær so ruddiliga uppibori›.

KÍ enda›i sostatt á fremsta plássi, og tær hava vunni› átta dystir í endaspælinum í ár, me›an tær tvær fer›ir fóru av vøllinum uttan stig, og var hetta eftir útidystirnar í Vági og í Runavík.

## HB snáva›i í Vági

Í Vági var dystur millum HB og VB, sum vóru á ávikavist ø›rum og tri›ja plássi undan dystinum. HB hev›i 21 stig, me›an VB hev›i 19, og sostatt skuldi HB »bert« hava ein javnleik fyri at ogna sær í hvussu so er silvurmerki. VB skuldi harafturímóti hava ein sigur, og ta› sást eisini aftur í dystinum.

Tá bert sjey minuttir vóru farnir, leg›i Rini Mørk VB á odda, og tann stø›an helt sær til hálvleiks. Málleyst var til 71. minutt, tá Gu›run í Lágabø økti um lei›sluna. Hetta var hennara fjúrtanda mál í ár. Hetta sá út til at taka luftina úr HB kvinnunum, og bert tríggjar minuttir seinni sta›festi Laila Jespersen sigurin fyri VB. Dysturin í Vági var› ikki væl spældur, einamest tí at vindurin var so nógvur, men VB dróg ein sannførandi 3-0 sigur í land, og tær enda›u sostatt á ø›rum plássi, me›an HB kvinnurnar máttu taka til takkar bronsumerkjunum.

Bæ›i VB og HB megna›u at geva KÍ kapping til sí›sta leikdag, men sum sagt megna›u hvørki av li›unum at gerast føroyameistarar. HB tapti tríggjar dystir samanlagt í endaspælinum í ár, tveir móti KÍ og ein móti VB. Hesir ósigrar kosta›u í sí›sta enda d‡rt. VB tapti eins og KÍ tveir dystir í endapælinum í ár, men tær spældu tí›liga í seinnu hálvu javnleik í Havn móti B36, og tá bert tvey stig vóru millum KÍ og VB samanlagt, ver›ur ta› einamest hesin dysturin, VB kvinnurnar fara at minnast.

## NSÍ frálíkan endaspurt

NSÍ spældi útsetta dystin móti Skála mitt í viku, á›renn tær sunnudagin skuldu til Havnar at spæla móti B36. Hesir bá›ir dystir høvdu sum so einki at siga, men vi› tveimum sigrum kundi NSÍ koma framum B36 upp á fjór›a plássi. Móti Skála gjørdu tær sína skyldu og vunnu ein sannførandi 4-0 sigur. Hálvleiksstø›an var 1-0 til NSÍ, og var ta› ikki so óvænta› Irdi Hansen, sum skeyt máli›. Í seinna hálvleiki økti Oddvá Christiansdóttir um lei›sluna, á›renn Irdi Hansen gjørdi ta› til bæ›i 3-0 og 4-0, sum gjørdist endaliga úrsliti›.

Sunnudagin var NSÍ í Havn og vitja›i. Á›renn dystin hev›i B36 tíggju stig, me›an NSÍ hev›i níggju stig. Sostatt var naka› at spæla um hjá hesum bá›um li›um, og B36 var favorittur at vinna dystin. Men solei›is skuldi ikki ganga. Mi›skei›is í fyrra hálvleiki fekk NSÍ brotsspark, og Elinbjørg Hammer setti bóltin í neti› til 1-0. Sí›ani kom á›urnevnda Irdi Hansen veruliga í gongd, og gjørdi hon ikki minni enn fimm mál á ra›.

Fyrst økti hon um lei›sluna beint fyri hálvleik, og í seinna hálvleiki skeyt hon ikki minni enn f‡ra afturat. Ta› vil vi› ø›rum or›um siga, at hon tveir teir seinastu dystirnar skeyt heili átta mál, og kom hon sostatt uppá 14 mál samanlagt í landskappingini. Maibritt Olsen skora›i sjeynda máli›, á›renn B36 fekk pynta uppá óvænta›a úrsliti› vi› máli frá Súsonnu Hansen.

## Ni›urstø›a

Nú landskappingin í kvinnufótbólti ár 2000 er av, kunnu vit sta›festa, at hetta var eitt spennandi ár, og spenningurin helt sær enntá til sí›sta leikumfar. KÍ enda›i vi› 24 stigum, me›an VB var í hølinum vi› 22 stigum. HB hev›i 21 stig, og sostatt kunnu vit sta›festa, at ta› var sera javnt í toppinum. Øll tr‡ li›ini høvdu møguleikan at ogna sær meistaraheiti› á›renn seinasta dyst, men ta› var uppibori›, at KÍ, sum dró longsta strái›, nú eru n‡ggir føroyameistarar.

Mi›skei›is í endaumfarinum b‡tti kappingin seg upp í tveir bólkar, har á›urnevndu li›ini KÍ, VB og HB drógu frá trimum teimum ni›astu li›unum NSÍ, B36 og Skála. HB á tri›ja plássi enda›i sum sagt vi› 21 stigum, me›an NSÍ á fjór›a plássi hev›i tólv stig. B36 fekk 10 stig og sí›ani kom Skála, sum ikki megna›i at fáa naka› stig til høldar. NSÍ hev›i ein sera gó›an endaspurt, og komu tær framum B36, tá tær í seinasta dystinum vunnu heili 7-1. B36 hevur harafturímóti havt eitt sera vánaligt kappingarár, og vóru tær kanska størsta vónbroti› í ár. B36 kvinnurnar plaga at teljast millum toppli›ini, sum eru vi› í strí›num um meistaraheiti›, men í ár enda›u tær heilt ni›ri á fimta plássi frammanfyri Skála.

KÍ er sostatt føroyameistari› ár 2000, og Sosialurin ynskir teimum hjartaliga tillukku.

**Úrslitini seinastu vikuna gjørdust hesi:**

*Skála-KÍ 1-4*
**KÍ:** Rannvá Andreassen 3
Viviann Bjartalí› 1
**Skála:**
Ingun Johansen 1

*VB-HB 3-0*
**VB:** Rini Mørk 1
Gu›run í Lágabø 1
Laila Jespersen 1

*B36-NSÍ 1-7*
**B36:** Súsanna Hansen 1
**NSÍ:** Irdi Hansen 5
Oddvá Christiansen 1
Maibritt Olsen 1

*Skála-NSÍ 0-4*
**NSÍ:** Irdi Hansen 3
Elinbjørg Hammer 1

## Stø›an, 1. deild kvinnur

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | KÍ | 10 | 8 | 0 | 2 | 46 | 12 | 34 | 24 |
| 2. | VB | 10 | 7 | 1 | 2 | 46 | 15 | 31 | 22 |
| 3. | HB | 10 | 7 | 0 | 3 | 27 | 17 | 10 | 21 |
| 4. | NSÍ | 10 | 4 | 0 | 6 | 26 | 21 | 5 | 12 |
| 5. | B36 | 10 | 3 | 1 | 6 | 14 | 24 | -10 | 10 |
| 6. | Skála | 10 | 0 | 0 | 10 | 3 | 73 | -70 | 0 |



# Ongantí› fyrr veri› kapping um plássini

*KÍ venjarin Jón Harald Poulsen hevur fingist vi› kvinnufótbólt í fimtan ár. Eftir at FM heiti› er komi› undir land, sigur hann, at hetta er fyrsta ári›, at so nógv fólk hevur veri› til taks, og at kapping hevur veri› um plássini*

Heini í Skorini

Eftir at KÍ kvinnurnar ogna›u sær føroyameistaraheiti› inni á Skála, spurdu vit venjaran Jón Harald Poulsen, hvør høvu›sorsøkin til FM heiti› er.

– Høvu›sorsøkin til gó›a úrsliti› er, at vit hava veri› so væl manna›ar í ár, og at ta› hevur so nógv fólk bæ›i til venjing og dyst. Millum fjúrtan og tjúgu kvinnur hava veri› til venjing hvørja fer›, og ta› má sigast at vera gó› uppmøting. Ta› er í stuttum ta›, sum hevur gjørt mun hjá okkum í ár.

KÍ enda›i í fjør á fjór›aplássi, og tá hev›i Jón Harald kvinnuli›i› í Klaksvík undir hond seinnu helvt.

– Munurin frá í fjør til í ár er tann, at tær hava veri› nógv meiri nærlagdar vi› uppmøtingini til venjing, og ta› hevur sum sagt veri› nógv fólk at tiki› av gjøgnum ári›. Jón Harald leggur afturat, at ta› í ár hevur veri› ein blandingur av yngri og eldri leikarum, og ta› hevur eisini sett síni spor.

Spurdur, hvat teirra størsta styrki á vøllinum hevur veri›, svarar Jón Harald, at ta› hevur veri› konditiónin og likamlig styrki. Hann nevnir eisini, at ta› hava veri› sterkir leikarar á øllum plássum, og at ta› hevur veri› kapping um plássini.

– Til dømis høvdu vit sunnudagin móti Skála f‡ra leikarar á beinkinum, sum eru sera gó›ir, har onkur hevur veri› í byrjunaruppstillingini gjøgnum ári›, og ta› vísir styrkina í okkara hópi. Ta› hevur stutt sagt veri› hør› kapping um plássini, og ta› hevur ongantí› veri› fyrr, so leingi eg havi fingist vi› kvinnufótbólt.

Jón Harald Poulsen sigur, at tá hann tók vi› sum venjari seinnu helvt í fjør, og tá kappingin byrja›i í ár, var málsetningur hansara ikki endiliga at gerast føroyameistari, men meiri at hjálpa KÍ at hava ein venjara til kvinnurnar.

– Men tá ta› so gekk so væl hjá okkum, vildi ein sjálvandi gerast føroyameistari, og tá vit so vunnu steypakappingina, samstundis sum ta› gekk væl í endaspælinum, vildu vit vinna greipuna.

Tá vit koma inn á skipanina av kappingini í ár, heldur Jón Harald, at fyri teirra vi›komandi hev›i veri› gott at havt pláss fyri meiri enn einum li›i.

– Kanska skuldu vit spælt hálvan vøll, tí fyri okkara vi›komandi hev›i veri› gott vi› einum 1. deildarli›i, umframt einum hálvum li›i afturat, tí fleiri kvinnur hava bert leikt ein ella tveir dystir í ár, og ta› er harmiligt. Ella hev›i ta› veri› eitt hugskot at spælt sum nú er, og so havt eitt B-li› vi› sjey leikarum, sum so kundu leikt hálvan vøll.

Spurdur um føroyskan kvinnufótbólt sum heild, heldur Jón Harald, at hann fyri teirra vi›komandi avgjørt er í menning.

– Nøkur vilja vera vi›, at ta› gongur ni›ureftir, men í Klaksvík gongur uppeftir, og kvinnufótbólturin her er í menning. Fyri fyrstu fer› í lívi mínum hava so nógvar møtt upp og veri› vi› í hópinum, og tær hava veruliga tiki› uppgávuna álvara í ár.

Jón Harald heldur tó, at ta› er ney›ugt vi› einum A-landsli›i, tí ta› gevur leikarunum meiri at spæla fyri.

– Ta› hev›i veri› sera gott vi› einum A-landsli›i, tí eftir míni ásko›an hava kvinnurnar betri møguleika at koma langt enn menninir úti í heiminum. Um ta› so ikki er EM ella VM, skuldu vit havt eitt A-landsli› fyri kvinnur, sum kanska var vi› í oyggjaleikunum ella okkurt tílíkt.

Vit takka venjaranum hjá n‡ggju føroyameistarunum, Jón Harald Poulsen, fyri práti›, og Sosialurin ynskir honum hjartaliga tillukku vi› føroyameistaraheitinum.



*Føroyameistarar 2000 KÍ*

Mynd: SJH

# Hart arbei›i hevur givi› úrslit

*Toppskjúttin í føroysku kvinnudeildini, Malena Josephsen, heldur, at hart arbei›i líka sí›ani februar mána› er atvoldin til greipuna í ár*

Heini í Skorini

Malena Josephsen hevur veri› ein sera ey›s‡ndur leikari í kvinnudeildini í ár, og enda›i hon kappingina vi› at vinna greipuna, umframt ta› at hon gjørdist besti málskjútti.

Malena sigur, at hart arbei›i sí›ani í februar mána›i hevur veri› atvoldin til gó›u úrslitini hjá KÍ kvinnunum í ár.

– Vit byrja›u longu at venja í februar, vit hava veri› umlei› tjúgu hvørjafer›, og ta› hevur nú givi› úrslit. Vit vildu vinna greipuna, og vi› hør›um arbei›i hevur ta› nú eydnast okkum.

KÍ hevur ikki ligi› á odda alt kappingarári›, tí eftir at tær tri›seinasta leikumfar taptu heili 6-0 í Vági, var VB á odda. Men vikuna eftir bastu klaksvíkskvinnurnar VB á heimavølli 5-2, og so høvdu tær aftur kortini í hondini, á›renn seinasta leikumfar móti Skála.

– Eg haldi, at dysturin, vit fara at minnast best, er 5-2 sigurin í Klaksvík móti VB, sum jú gjørdi, at vit aftur komu upp á ovastu rók.

– Munurin frá í fjør er tann, at vit hava havt bæ›i yngri og eldri leikarar vi› á li›num, og ta› hevur veri› gott fyri li›i›. Í fjør vóru ta› næstan bara ungir leikarar, men í ár komu fleiri leikarar aftur til okkara. Í hesum sambandi nevnir Malena Bár›u Skaale, Margit Joensen og málverjan, saman vi› tvíbur›unum Rannvá og Ragnu Andreassen, sum allar hava havt stóran t‡dning fyri li›i›.

Malena heldur ikki, at kappingin í ár hevur veri› hør›, tí tær hava jú vunni› móti teimum flestu toppli›unum.

– Nú taptu vit í Runavík, og ta› kosta›i okkum nógv. Í Vági var ta› stormur, og vit komu ongantí› fyri okkum tann dystin. Men vit skuldu bara vísa teimum, at vit vóru betri, og ta› gjørdu vit so vi› at vinna vikuna eftir í Klaksvík, endar n‡klakti greipuvinnarin Malena Josephsen, sum í ár gjørdist toppskjútti í bestu føroysku kvinnudeildini vi› 17 málum.

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Malena Josephsen | KÍ | 17 |
| Irdi Hansen | NSÍ | 14 |
| Gu›run í Lágabø | VB | 14 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 12 |
| Rannvá Augustinussen | VB | 7 |
| Annika Godtfred | HB | 6 |
| Ey›vør úr Dímun | HB | 6 |
| Vivian Bjartalí› | KÍ | 6 |
| Laila Jespersen | VB | 6 |
| Maibritt Olsen | NSÍ | 5 |
| Ey›frí› Christiansen | HB | 4 |
| Gunn Müller | HB | 4 |
| Vivian Thorleifsson | HB | 4 |
| Elsa Maria Simonsen | KÍ | 4 |
| Elinbjørt Hammer | NSÍ | 4 |
| Guri› Mortensen | VB | 4 |
| Halltóra Joensen | VB | 4 |
| Elsebeth Jónsson | B36 | 3 |
| Maria Vang | B36 | 3 |
| Sólvá Joensen | B36 | 3 |
| Margit Joensen | KÍ | 3 |
| Ragna Andreasen | KÍ | 3 |
| Annika Poulsen | VB | 3 |
| Laila Enghamar | B36 | 2 |
| Ingun Johansen | Skála | 2 |
| Diana Dahl | VB | 2 |
| Rini Mørk | VB | 2 |
| Selma Dahl | B36 | 1 |
| Sólger› Viderø | B36 | 1 |
| Súsanna Hansen | B36 | 1 |
| Maria Johnsson | HB | 1 |
| Frí›a Petersen | KÍ | 1 |
| Marian Joensen | KÍ | 1 |
| Anna Malena Højgaard | NSÍ | 1 |
| Elsebeth Olsen | NSÍ | 1 |
| Oddvá Christiansen | NSÍ | 1 |
| Sólvá Solmunde | Skála | 1 |
| Sólbjørg Kjærbæk | VB | 1 |
| Sjálvmál | | 4 |

adidas